ítróttur

Nr. 207 • leygardagur • 29. oktober 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Greiðar útmeldingar

**Súni Olsen skal á miðvøllin. Ungu útisetarnir í Onglandi skulu slúsast inn í hópin. Og uppspæl og gjøgnumbrot skulu hava hægri raðfesting, er millum annað tað, sum Jógvan Martin Olsen fer at leggja dent á**

LANDSLIÐSVENJARI
*Jákup Mørk*




*So varð tað heilt alment. Jógvan Martin Olsen er nýggjur høvuðsvenjari hjá føroyska fótbóltslandsliðnum. Her sæst hann saman við formanninum í landsliðsnevndini, Jens Erik Magnussen, og FSF-bossinum, Óla Holm*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Spenningurin var kanska farin úr ballónini undan tíðindafundinum, skilt á tann hátt, at navnið á venjarunum var komið út. Men fyri tað var tað ein rættiliga errin Jógvan Martin Olsen, sum kundi seta undirskriftina á sáttmálan. Ein sáttmáli, sum í tvey ár ger hann til høvuðsvenjara hjá føroyska fótbóltslandsliðnum, eins og hann er maðurin, sum kemur at standa við ítróttarligu ábyrgdini av U-landsliðsarbeiðinum og verður knýttur at føroysku venjaraútbúgvingini.

## Greiður boðskapur

Og tá tosað varð um arbeiðssetningin, sum nýggi venjarin hevur sett sær, var talan um ein óvanliga greiðan boðskap.

- Fyrst og fremst, so má eg siga, at eg eri errin vegna samlaðu føroysku venjararnar, nú FSF hevur valt eina føroyska loysn til fótbóltslandsliðið. Og persónliga eri eg eisini fegin og errin, legði hann fyri.

Og kanska fyri at fara beint í krovið á kritakarum sínum, so staðfesti venjarin alt fyri eitt, at hann helt seg hava møguleikar at tilføra liðnum nakað nýtt, eins og hann alt fyri eitt staðfesti, at tað var hansara ynski, at John Petersen varð knýttur at landsliðnum,.

- Eg havi arbeitt saman við John í nógv ár. Eg var sjálvur á Skála eftir honum í 1993, fyri at fáa hann inn á Toftir at spæla í fyrstu deild, og gjøgnum árini hava vit havt eitt hampuliga tætt samband. Hartil haldi eg, at hann hevur nakrar framúr góðar menninskjansligar eginleikar, eins og hann hevur eitt sera gott eyga fyri spælinum. Og hetta er nakað, sum vit vónandi kunnu fáa gleði av, ljóðaði skoðsmálið til nýggja hjálparvenjaran.

## Broytingarnar

Tá tosið síðani snúi seg um nýggja høvuðsvenjaran, tóktist Jógvan Martin eisini vera rættiliga greiður um, hvørjar broytingar hann fyrst og fremst fer at leggja seg eftir.

- Við tað, at talan nú er um ein føroyskan venjara, er væl ikki annað enn náttúrligt, at eg komi at hava eitt tættari samband við venjararnar í ymsu feløgunum. Tað skuldi givið okkum størri møguleikar fyri at fylgja venjingini og menningini av einstøku spælarunum betri.

- Hartil er so eisini ætlanin, at vit skulu fáa eitt sonevnt analysu-program, sum kann gerast eitt amboð í eftirmetingum okkara.

Og eisini viðvíkjandi spælihátti og spælaratilfari er líkt til, at broytingar verða nevndar. Hetta var nevnliga eisini millum tað, sum Jógvan Martin førdi fram á tíðindafundinum. Eisini hóast hann legði dent á, at hetta heilt avgjørt verður gjørt sum framhand av tí arbeiði, sum er gjørt seinnu árini. Millum broytingarnar, sum itøkiliga vórðu nevndar á tíðindafundinum, kunnu nevnast: At Súni Olsen verður fluttur á miðvøllin, og at nýggjur vinstri bakkur tí skal finnast. At Johan Troest Davidsen og Christian Restorff Mouritsen verða slúsaðir inn í landsliðshópin. At servenjingar í størri mun verða partur av landsliðsvenjingunum. Og at gjøgnumbrots- og umstillingsspælið hjá føroyska liðnum skal betrast.

Talan var í øllum førum um stór orð, sum vónandi eisini verða framd í verki. Um tað fer at eydnast, er so ein spurningur, sum tað enn ikki ber til at svara. Men tað hava nýggju venjararnir tey bæði komandi árini til at prógva.

# Nýtt og nýtt

**Tíðin var búgvin til eina føroyska loysn, har vit eisini vísa væl útbúnum føroyskum venjarum álit og ábyrgd, heldur Óli Holm, formaður í FSF**

LANDSLIÐSVENJARI
*Jákup Mørk*

Tá Henrik Larsen fekk at vita, at FSF hevði tikið støðu um, at sáttmálin við hann ikki varð longdur, var ein av grundgevingunum, at Fótbóltssambandið fegið vildi royna nýtt.

Tí hongur tað ikki heilt saman, tá »nýggja« loysnin er ein venjari, sum hevur verið hjálparvenjari í níggju ár. Ein spælari, sum hevur spælt 10 ár á landsliðnum. Og ein spælari, sum hevur spælt í 17 ár á føroyska fótbóltslandsliðnum.

Men Óli Holm, formaður í FSF, tóktist tó á ongan hátt skakaður, tá spurningurin varð settur.

- Alt annað líka, so er talan um eitt nýtt konsept, sum als ikki kann sammetast við tað, sum vit hava havt. Við hesum hava vit sett ein føroyskan venjara, sum hevur allar fakligar førleikar. Og vit hava ein hjálparvenjara, sum kennir føroyskan landsliðsfótbólt í odd og egg. Og tað haldi eg avgjørt hevur stórt virði.

- Annars eri eg ikki ein av teimum, sum haldi, at bara venjarin er útlendskur, so er alt gott. Í mínum hugaheimi er tað fult so týdningarmikið, at okkara venjaraverð - sum við árunum er vorðin sera væl útbúgvin - eisini fær álit. Vit hava í 11 ár havt útlendskan venjara, og vit í nevndini vóru allir samdir um, at nú var tíðin komin til eina føroyska loysn, staðfesti Óli Holm.

# John ivaðist ikki

John Petersen sigur, at hann var eitt sindur bilsin, tá honum brádliga stóð í boði at gerast hjálparvenjari hjá føroyska fótbóltslandsliðnum.

- Eg var tó alt fyri eitt áhugaður, og eftir eina stutta umhugsunartíð segði eg eisini ja. Tað er jú ein møguleiki, sum tú ikki fært hvønn dag, og sjálvur vóni eg eisini, at eg kann tilføra liðnum nakað við teimum royndum, sum eg havi.

*Men tú hevur ongan tíð áður roynt teg sum venjara?*

- Tað havi eg eisini hoyrt summi siga. Men hinvegin havi eg oftani hugsað tann vegin. Og í so máta haldi eg hetta vera eitt framúr høvi at fáa gongd á tann partin. Ikki minst, at eg her sleppi at arbeiða saman við einum so fakliga dugnaligum venjara. Í løtuni verður kannað, hvørt eg kann fáa góðskrivað nakað í venjaraútbúgvingini. Her hava danskir superligu-spælarar møguleika at koma beinleiðis inn á seinasta stigan í útbúgvingini, og so er spurningurin, um eg kann fáa líknandi góðskriving, staðfestir John at enda.

Og hann leggur afturat, at í útgangsstøðinum verður tað so, at hjálparvenjarin framhaldandi fer at búgva í Danmark. Í blaðnum í gjár róðu vit annars uppundir, at tað kundi hugsast, at familjan flutti til Føroyar, men tann partin sigur John ikki vera aktuellan í løtuni.

**-mørk**